gult cyan magenta svart

Stakkurin eitt frálíkt fer›amál

Tjørnuvíkingar hava eitt frálíkt fer›amál í Stakkinum. Ta› er óført, at teir hava gjørt av at bjó›a fer›afólki út hagar á hvørjum sumri. Og hetta er vor›in ein rættiliga væl umtóktur túrur

EDVARD JOENSEN

Fari› ver›ur út í Stakkin vi› rennistreingi

Stakkstúrarnir hjá tjørnuvíksfólki eru vor›nir eitt satt hitt á hvørjum sumri. Hesi árini, skipa› hevur veri› fyri fer›afólkatúrum út í Stakkin, er undirtøkan bara vaksin.

Túrurin ver›ur vanliga skipa›ur solei›is, at luttakararnir ver›a b‡ttir í bólkar, sum so sta›kendir fer›alei›arar fara vi›. B‡ti› er fyri, at ikki ov trongligt skal ver›a at ganga ni›an gøtuna ni›an í Torvadal, sum plagar at vera fyrsti ste›gur á fer›ini.

Til túrin er nógv, sum skal berast út í Stakkin, á›renn fer›afólki› kemur út. Umframt at fólk skal vera har úti at syrgja fyri, at rennistrongurin er klárur, tá fer›afólki› kemur út.

Teir fyrstu berararnir og sleipararnir fara tí eitt sindur undan høvu›sfeltinum.

Tjørnuvíkingar hava tann gó›a si›, at á›renn fari› ver›ur, ver›ur sungi› í túninum uttan fyri Bygdarhúsi›. Fer›in er, hóast ein fer›afólkaútfer›, ikki heilt vandaleys, og teir halda gamlan si› vi› eini stillari løtu, á›renn fari› ver›ur í bakkan.

So ver›ur lagt til brots, og vit ragga okkum ni›an brekkuna móti Torvadali. Bla›ma›urin sleppur vi› teimum, sum undan fara, solei›is at til ber at taka nakrar myndir.

Komnir á Torvadal ver›ur eftir gomlum si›i hvílt. Her plagdu neytakonurnar at hvíla, og her er eisini reist ein steinpláta teimum til minnis.

Men kanska gjørdu vit í so leingi av, ella eru tey seinnu tjóvstarta›. Tí ikki høvdu vit meira enn reist okkum, so var fyrsta gongan á rø›ini.

So nú var at taka halan á hárógvuna og skunda sær í Stakkin, so fólk ikki skuldu bí›a ov leingi eftir at sleppa út.

Vit taka tann lættara vegin. Vit fara í Dumbustíggj. Ein rás undir Kambinum, har ikki er rá›iligt at fara vi› ov nógvum ókendum fólki. Tey fara upp um Kambin.

Komnir út í Stakkin, byrjar ein strævin dagur av álvara hjá flutningsmonnunum, me›an vit onnur kunnu ganga og hyggja okkum um og njóta ta› vakra úts‡ni›.

Tjørnuvíkingar hava eitt frálíkt hús í Stakkinum. Vatn og ljós er inni, umframt koyggjur, so væl ber til at liggja har úti, nú fleygatí›in er fyri.

Hendan dagin ver›ur húsi› tó brúkt at bjó›a fer›afólkinum eitthvørt upp í munnin. Sodavatn og chokolátakeks. Alt fø›i vi› nógvum sukri, sum er væl umhugsa›. Ikki er ætlan teirra, sum reika fyri, at nakar skal leggjast fyri av maktarloysi.

Í ár hava teir veri› har úti og stoypt plattform framman fyri húsi›, solei›is at betri umstø›ur eru hjá fólki at standa uttan fyri og njóta løtuna. Eisini er gjørt eitthvørt solei›is, at fólk fáa gjørt burtur av sær, um ein skuldi komi› á trongd á túrinum.

Bla›ma›urin hevur havt høvi› at vitja ein av fleygasessunum í Stakkinum.

Lesningur er lagdur, at halda sær í oman brattan. Holut er og bleytt, so ta› hendir, at vit stíga heldur djúpt vi›hvørt. Og so hesin deymurin av fuglaskræpu.

Ymiskt er har, sum a›rasta›ni, hvussu fuglurin roynist

Teir hava fasta skipan, tá teir fleyga lunda í Stakkinum. Skipanin er, at fleygama›urin eigur teir fyrstu 200 lundarnar, hann fær. Sí›an eigur hann helvtina av restini, me›an hin helvtin ver›ur b‡tt til jør›ina.

Tungt er at koma upp aftur úr sessinum. Vit eru staddir heilt ni›ri á eggini, og brekkan er beint í bróstinum. Ikki er ta› stóra vi›føri›. Eina fototasku, ta› er alt. Men ta› er nóg tungt kortini.

Fleygama›urin skal bera fongin, stongina í a›rari hondini og so halda í lesningin vi› hinari. Ta› man vera óhugnaliga tungt, kann eg væl ímynda mær.

Tá teir eru og fleyga í Stakkinum, eru teir ofta bara einir tríggir mans. Og so kann vera tungt at koma heimaftur. Fyrst skulu teir um Sundi› og sí›an at bera.

Fer›alei›arin grei›ir skemtandi frá, at teir plaga at royna at fáa so miki›, at teir ikki orka at bera alt sjálvir.

»So hava vit eina umbering at senda bo› eftir fólki at hjálpa okkum.«

Men ein slíkur túrur fær eisini ein enda, og vit skulu innaftur.

Jú, vit fara upp í bí›irø›ina vi› rennistrongin. Og hóast vit nú hava veri› eina heilt fitta løtu úti í Stakkinum, er rø›in innan fyri vi› fólki, sum er á veg út, framvegis long.

Flestu fólk fara aftur um Kambin, men onkur er, sum sn‡tir eitt sindur og fer gjøgnum Dumbudtíggj, hóast fyrireikarunum ikki dámar ta› so væl. Tí heilt vandaleyst er ta› ikki hjá ókunnufólki at ganga tann vegin.

Sum vant endar túrurin í Bygdarhúsinum, har tjørnuvíkskonur standa til rei›ar vi› bor›um, sum bogna av brey›i vi› føroyskum vi›skera.

Ein túrur, sum avgjørt er verdur at royna.

Ikki er rá›iligt at fara eftir rásini undir Kambinum vi› ov nógvum ókendum fólki

Fakta:

Eitt sindur tungt at ganga bá›ar vegir, tá ein skal um Kambin.

Túrurin varir einar fimm tímar.

Í summar ver›a tveir túrar gjørdir. Teir ver›a sunnudagarnar 16. juli og 23. juli. Bá›ar dagar ver›ur fari› úr Tjørnuvík klokkan 13.30, og fólk ver›a bi›in um at møta naka› á›renn fari› ver›ur.

Kostna›ur: kr. 250,-

Tilmelding:
Dávur Emil Hansen
Tlf. 423353 ella
Asbjørn Djurhuus
Tlf. 433446/287066

Hvat hendir í Føroyum? www.kunning.fo

Í býin - altíð eitt stað at fara

Streymoy

Mat-seðilin
Hósdagin 6. juli: Høsnarungar
Fríggjadagin 7. juli: Svínakotelettir
Leygardagin 8. juli: Rullisteik
Mánadagin 10. juli: Kalkunsnitzel
Týsdagin 11. juli: Royktur medistari
Mikudagin 12. juli: Hakkibúff
Kostnaður 30,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu

Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

Lesið sosialin sosialin sosialin -tað loysir seg

Kaggin

Hóskvøldið LIVE-KVØLD við ALL THAT RAIN
Fríggja- og leygarkvøldið spælir ALL THAT RAIN
Hetta vikuskifti
Køkurin er opin
Tekningarlistin til útferð fyri Vestan liggur í barrini
Kaggin Kaggin Kaggin
Sosialurin - 311820
www.kaggin.fo

Long drinks Café
CLEOPATRA
Við gongugøtuna
www.marcopolo.fo
Opið er:
Mán.–Hós. kl. 17[00] – 23[30]
Fríggjadag kl. 17[00] – 03[30]
Leygardag kl. 17[00] – 03[30]
Sunnudag kl. 17[00] – 23[30]

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra - so er tað 311234
AUTO
BENZIN DIESEL KIOSK - ALT DØGNIÐ -
AUTO 311234

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650

Eysturoy

STEVNU-DANSUR
Stevnu-dansur verður á Strondum leygar-kvøldið MOONSHOT spælir



STRÁLAN og STÍF

Vilja tygum vi› í

Í b‡in - hvønn hósdag

Ynskja tygum at l‡sa í teiginum ***í b‡in***, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur

DAGFØR TEG HALT SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.